Myndir: Google














Larry Page og Sergey Brin grundadu Google 1998

## Hetta gera vit við Google...

Vit senda teldupost við at nýta **Gmail**. Tænastan er ein tann best umtókta í heiminum og ber til at goyma óavmarkað av posti.

Vit blogga við at nýta **blogger**. Heimins størsti bloggportalur, ið allar adressur við orðinum **"blogspot"** eru knýttar til. Google keypti **Blogger 2003** frá Evan Williams, ið síðani hevur bygt **Twitter**.

Vit goyma okkara myndir á **Picasa**. Fyri at sleppa frá at goyma myndirnar á egnari teldu ber til at sortera og goyma myndirnar inni á **Picasa**.

Vit lesa og skriva við **Google Docs**. Trupulleikarnir við ymiskum **Word** forritum, sum ikki tosa sama mál, eru loystar við **Google Docs**, sum lesur øll tey ymisku forritini.

Vit finna runt við **Google Maps**. Kort yvir so at siga allan heimin, sum eisini ber til at kobla saman við GPSaranum.

Vit læra okkum landalæru við **Google Earth**. Fylgisveinamyndir av øllum heiminum - og mánanum- og eisini Mars.

Vit hyggja eftir filmi á **Youtube**. Heimins størsta sjónvarpsrás, har ein og hvør kann legga sín egna film út. Nógvir fjølmiðlar, politikarar og artistar hava egnar rásir á Youtube. Google keypti **Youtube** fyri 1,65 milliardir í 2006, og heimasíðan er ein av teimum fáu, ið ikki bera seg.

Og vit nýta **Google Translate**, **Google Code**, **Google Alerts**, **Google Reader**, **Google Sites**, **Google History**, **IGoogle** og nógv, nógv meira. Listin gerst næstan longri fyri hvønn dag, ið gongur.